FKF jour.nr. 09-124

Uppskot til kunngerð um skipan og undirvísing í forskúla

Við heimild í § 4, stk. 2 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 34 frá 28. apríl 2009, verður ásett:

Kap. 1

Endamál

§ 1. Virksemið í forskúlanum skal vera sameindur partur av arbeiði skúlans at stuðla fjølbroyttu menningini og støðugu læritilgongdini hjá einstaka næminginum, so næmingurin fær avbjóðingar, har hann kann menna sítt forvitni, hugin at læra og skapanargleði.
Stk. 2. Virksemið verður skipað soleiðis, at næmingarnir virknir taka lut og ávirka arbeiðið í forskúlanum bæði sum einstaklingar og partur av felagsskapinum, og at næmingarnir kenna seg tryggar við skúlans arbeiði og umhørvi.
Stk. 3. Virkað verður fyri, at einstaki næmingurin í fjølbroyttu menningini skal hava møguleika at ogna sær fakliga vitan og førleika, sum part av byrjanarundirvísingini.
Stk. 4. Undirvísingin í forskúlanum skal skapa samanhang í skiftið frá heimi, dagstovni ella dagrøkt til skúla og millum forskúla, 1. flokk og frítíðarskúla.
Stk. 5. Barnið skal læra at samstarva, fáa møguleika at menna sín sosiala førleika, taka avgerðir og kenna samábyrgd av arbeiðinum í flokkinum, virða onnur og duga at nýta meginreglurnar fyri at liva og virka í einum fólkaræðisligum samfelagi.

Kap. 2

Innihald

§ 2. Leikur og spæl skal vera ein týðandi partur av virkseminum í forskúlanum bæði sum amboð í undirvísingini, so samspæl verður millum læring og leik, og sum sjálvstøðugt spæl.
Stk. 2. Undirvísingin skal taka støði í og menna førleikar, vitan og royndir, sum næmingarnir hava ognað sær heima, í dagstovni/dagrøkt og frítíð.
Stk. 3. Í undirvísingini verður dentur lagdur á, at næmingarnir menna áhuga og tilelving fyri fakliga arbeiðinum, sosiala felagsskapinum og serligu arbeiðsháttunum, so at forskúlin verður partur av menning barnsins og grundlarlagum undir framhaldandi skúlagongd.
Stk. 4. Virksemið verður lagd soleiðis til rættis, at næmingarnir kenna, at teir eru partur av einum sosialum felagsskapi.

§ 3. Innihaldið í undirvísingini skal í minsta lagi fata um grundstøði í:

1. Mál og málmennin
2. Støddfrøði og náttúru
3. Handaverk og list
4. Rørslu og motorikki
5. Sosialum førleikum
6. Samveru og samstarvi

Stk. 2. Næmingarnir eiga at læra at nýta skúlabókasavnið og kunningartøkni sum ein týdningarmiklan part at søkja sær førleika og vitan. Næmingarnir eiga hava atgongd til skúlabókasavnið í skúlatíðini.

Skipan

§ 4. Kommunur kunnu eftir umsókn fáa heimild at seta forskúlaflokk/ar á stovn, og kunnu kommunur eisini samstarva um at skipa forskúlaflokk/-ar.
Stk. 2. Kommunan ber allar útreiðslur av forskúlanum á staðnum.
§ 5.Forskúlaflokkur skal hava tilknýti til ein fólkaskúla og skal húsast undir somu lon sum kommunali skúlin ella eftir serligari skipan við tilknýti til kommunala skúlan.
Stk. 2. Skúlaleiðarin hevur dagligu ábyrgdina av forskúlanum og setir og loysir úr starvi starvsfólkini í forskúlanum.

§ 6. Forskúlaflokkur kann verða skipaður, tá ið 12 næmingar eru í flokkinum, og eigur næmingatalið í mesta lagi at vera 24 næmingar við skúlaársbyrjan.
Stk. 2. Undirvísingartímatalið í forskúlaflokkinum er 20 undirvísingartímar um vikuna, og verða 2/3 av tíðini nýttir til undirvísing og 1/3 til spæl og leik.
Stk. 3. Skúlin kann lutvíst samskipa undirvísingina í forskúlaflokki, 1. og 2. skúlaári.
Stk. 4. Stk. Skipað samstarv skal verða millum lærarar og pedagogar í forskúla, byrjanarundirvísing og frítíðarskúla.

Kap.4

Gildiskoma

§ 7. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, 26. november 2010

Helena Dam á Neystabø (sign.)

Landsstýriskvinna

/ Olaus Jespersen (sign.)